# ítróttur

Nr. 91 • hósdagur • 16. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Heidi Andreasen:

# – Ein uppliving fyri lívið

**Heidi Andreasen fekk ikki heiðurin sum ársins ítróttarfólk við breki í heiminum, men hóast tað er hon als ikki vónbrotin. – Hetta hevur verið ein uppliving fyri lívið, sum eg ongantíð fari at gloyma, sigur hon**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

– Eg eri als ikki vónbrotin av, at eg ikki varð vald til ársins ítróttarfólk. Sjálvandi vilja øll vinna, men tað er bara ein vinnari millum tey fimm, sum vórðu innstillað til heiðurslønina, sigur 16 ára gamla Heidi Andreasen av Eiði.

Hon hevur síðan sunnudagin verið í franska greivadøminum Monaco, har hon luttók á Laureus World Sports Awards. Við Heidi í Monaco var venjari hennara Katrin Johansen.

– Bara tað at vera millum fimm tey fremstu, sum vórðu innstillað, er nóg mikið fyri meg, sigur ein spent Heidi Andreasen, tá vit høvdu hana í telefonini av Monte Carlo Grand Hotel.

Ársins ítróttarfólk við breki gjørdist Ester Vergeer úr Hollandi. Hon situr í koyristóli og hevur gjørt vart við seg innan tennis, og hon spælir eisini hon kurvabólt á hollendska landsliðnum. Ester Vergeer er 35 ára gomul, og hon er eisini kosin ársins ítróttarfólk við breki í Hollandi. Hini fýra, sum vóru við í kappingini, fingu ikki at vita, hvar í røðini tey vóru.

### Uppliving fyri lívið

Heidi Andreasen sigur, at henda ferðin í Monaco hevur verið ein stór uppliving, sum hon altíð fer at minnast.

– Hetta hevur verið ein uppliving fyri lívið, og eg eri glað fyri, at eg fekk møguleikan til at vera við. Eg havi ongantíð upplivað nakað so stórt og flott, sigur Heidi um karmarnar kring tiltakið, og hon hevur møtt nógvum kendum fólki í Monaco.

Hóast hon ikki vann, hevur Heidi fingið blóð á tonna og nýtt sjálvsálit at halda fram við svimjingini.

– Eg fari at gera enn meira við svimjingina í framtíðini. Nú havi eg júst havt skaða, so eg havi ikki vant serliga nógv seinastu mánaðirnar, men hetta fer at hjálpa mær at koma fyri meg aftur, sigur Heidi.

Spurd um hon hevur vónir um at verða innstillað aftur til Laureus virðislønina, svarar hon:

– Tað er ilt at siga, um eg fái henda møguleikan aftur. Tað eru so nógv ítróttarfólk um boðið, og bara fimm sleppa framat. Eg fari eisini at nýta hetta høvið at takka øllum teimum, sum hava stuðla mær úr Føroyum, sigur Heidi.

Tað einasta, sum hon hevði at fílast á eftir túrin í Monaco, var, at eingin á hennara aldri var har. Hóast hon royndi at hyggja eftir javnaldrum, fann hon ongan. Øll, sum vóru við á tiltakinum vóru tjúgu ár og eldri.

Annars fekk Heidi mynd av sær og eitt nú kendu tennisstjørnuni Boris Becker og supermodellini Heidi Klum. Tað var tó gerandiskostur hjá Heidi og Katrin av møta onkrum kendum. Hon greiðir eisini frá, at tær sigldu í Miðjarðarhavinum við einum marglætisbáti hjá einum millióningi.

Men samrøðan hjá okkum endar, tí júst tá koma tænarar á hotellinum við morgunmati upp á kamarið. Borðið verður trillað inn á kamarið, og tær fáa bert tað, sum tær hava biðið um frammanundan. Og alt er ókeypis sjálvandi.



*Heidi Andreasen sigur, at hetta hevur verið ein uppliving fyri lívið, sum hon ongantíð fer at gloyma*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Gott bridgeár í Klaksvík



*Í einstaklingakappingini hjá Klaksvíkar Bridgefelag vann Karl Isaksen, Debess Christiansen gjørdist nummar tvey og Odd Fjallsbak fekk triðja plássið*

Nú komið er út í mai mánað, hevur Klaksvíkar Bridgefelag lagt stilt fyri summarið.

Hetta hevur verið eitt gott ár hjá felagnum við fleiri styttri og longri kappingum, sum allar spældu væl av.

Klaksvíkar Bridgefelag er ikki nakað stórt felag og hevur sama trupulleika sum fleiri onnur bridgefeløg í landinum. Tað gongur ikki nóg væl við at fáa yngri fólk upp í felagið. Fráfall hevur verið í farna ári, men samstundis hendi tað gleðiliga, tá ið seinasta kappingarár byrjaði, at tað komu tríggir nýggir og yngri spælarar, og líkt er til, at tær ikki í bræði fara at kasta kortini frá sær.

Mikukvøldið er fasta spælikvøldið, og tá verður skiftivís spælt parakapping og liðkapping. Hetta árið varð spælt við fýra borð bæði í para- og liðkappingunum. Mánakvøld hevur tað mesta av vetrinum verið opið hús, t.v.s. at skylda var ikki at møta.

Kappingarárið endaði leygardagin 4. mai við árligu kappingini Bella Cup, og um kvøldið var veitsla fyri limum og makum. Tá vóru steyp handað vinnarunum í teimum ymisku kappingunum í vetur.

Í Bella Cup sleppur eingin at spæla við sínum fasta makkara. Tað var drigið um, hvørji skuldu vera makkarar,og úrslitið var ein stuttlig kapping ein hugnaligan seinnapart.

Úrslitini í teimum størru kappingunum vóru hesi:

Bella Cup
1. Marita Krossstein - Jógvan Clementsen
2. Debess Christiansen - Edvin Toftegaard
3. Jórun Højsted - Mogens Højsted

Einstaklingakappingin
1. Karl Isaksen
2. Debess Christiansen
3. Odd Fjallsbak

Parakappingin
1. Jens Jacobsen - Karl Isaksen
2. Marita Krosstein - Jórun Højsted
3. Randi Jacobsen - Álvur Klakk

Liðkappingin
1. Sámal Just Dahl - Steinbjørn Jacobsen, Marita Krosstein - Jórun Højsted
2. Karl Isaksen - Jens Jacobsen, Odd Fjallsbak - Hans E. Fjallsbak
3. Debess Christiansen - Páll Sigmund Sørensen, Jutta Heinesen - Julius Hansen.



# Súni Olsen aftur til GÍ



*Súni Olsen hevur valt at koma heimaftur til Føroyar, hóast hann hevði tvey ár eftir av sáttmálanum, og hann ætlar sær í skúla í Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**GÍ liðið verður munandi styrkt undan næsta umfari í landskappingini. Súni Olsen vendir heimaftur til Gøtu og fer nú at spæl við GÍ. Verjuleikarin Poul Ennigarð er eisini komin heimaftur**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

GÍ fær undan komandi umfari í landskappingini styrk frá tveimum leikarum, ið hava roynt seg á landsliðnum. Talan er um Súna Olsen og Poul Ennigarð.

Súni Olsen hevur verið sáttmálabundin í hollendska felagnum FC Zwolle í tvey ár, men nú hevur hann valt at gevast í hollendskum fótbólti, og hann flytir heimaftur í dag.

– Eg havi valt at koma heimaftur nú hóast eg hevði tvey ár eftir av sáttmálanum, sigur Súni Olsen, sum hevur søkt inn á FHS á Kambsdali.

Hann sigur seg eisini vera til reiðar at spæla við GÍ komandi mánadag, tá GÍ spælir móti GÍ.

Formaðurin í GÍ, Svenn Olsen, váttar, at Súni Olsen aftur kemur at spæla fyri GÍ. Eftir øllum at døma verður Súni Olsen at síggja á vøllinum, tá GÍ møtir Skála á heimavølli komandi mánadagin 2. hvítusunnudag.

Um Súni er við frá byrjan er sjálvandi ein avgerð, sum venjarin Johan Nielsen skal taka støðu til.

– Mær vitandi er alt enn ikki komið uppá pláss viðvíkjandi teimum ymsu pappírunum og skjølunum, sum skulu vera í lagi, áðrenn hann aftur kann spæla við GÍ, men tað liggur í øllum førum fast, at Súni Olsen fer at spæla við GÍ aftur, sigur Svenn Olsen, formaður í GÍ.

Súni Olsen er sostatt leysur av sáttmálanum við Zwolle, og hann kemur heimaftur á klettarnar í dag, hósdagin.

### Styrk í verjuni

Umframt Súna Olsen kann venjarin eisini nýta Poul Ennigarð í dystinum móti Skála. Poul hevur verið í Danmark í fimm vikur og tikið sveinaroyndina sum radiomekanikari. Hann spældi fleiri dystir í bólkaspælinum í steypakappingini, áðrenn hann fór niður.

Poul hevur ferðast aftur og fram millum Føroyar og Danmark í sambandi við útbúgvingina, men nú er hann liðugur, og Johan Nielsen hevur eisini hann tøkan til komandi dyst.

Hetta er ein ómetaliga stórur styrkur hjá GÍ, tí hesir leikararnir hava verið sera eyðsýndir í innan fótbóltsheimin seinastu árini. Poul Ennigarð hevur vunnið fleiri meistaraheiti við GÍ, og Súni Olsen hevur roynt seg sum yrkisleikara í tvey í Hollandi. Hann skuldi tí verið væl fyri, nú hann aftur kemur at spæla í føroysku 1. deild.

Annars verður sagt úr Gøtu, at allir menn eru klárir til komandi dyst.

# Bartal fekk heilaskjálvta

SKAÐI
*Stefan í Skorini*

Tá Bartal Eliasen skoraði móti GÍ sunnudagin, fekk hann samstundis heilaskjálvta. Tað var Sámal Joensen, sum royndi seg við skoti móti málinum. Skotið var ikki serliga gott og hevði kós burtur frá málinum. Men tá rakar hann høvdið hjá Bartali, og bólturin fer í málið. Summi hava hug at geva Sámali Joensen hetta málið, men av røttum er tað Bartal, sum skoraði.



*Bartal Eliasen fekk heilaskjálvta, tá hann skoraði móti NSÍ seinasta sunnudag*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá vóru góðir tjúgu minuttir eftir, men Bartal spældi allan dystin, hóast dygga brestin hann fekk í høvdið.

Tá Bartal kom heim frá venjing fríggjadagin kendi hann seg sjúkan og fór til læknan, sum staðfesti heilaskjálvta. Tí hevur sterki verjuleikarin ikki verið til venjing í hesi vikuni, men hann verður klárur aftur til mánadagin.

Ein avleiðing av heilaskjálvtanum er, at hann ikki minnist alt, sum fór fram á vøllinum móti endanum av dystinum, tá dómarin metti, at hann feldi Sonna L. Petersen, sum fekk brotsspark.

# Hesir bátar hava boðað frá luttøku í kappingin í 2002

**5-mannafør, dreingir**
1 Báran
2 Blikur
3 Drekin
4 Dúgvan
5 Falkur
6 Fípan Fagra
7 Firvaldur
8 Frúgvin
9 Havfrúgvin
10 Hvassi
11 Junkarin
12 Kollur
13 Ørnin
14 Ritan
15 Royndin Fríða
16 Sílið
17 Spógvin
18 Súlan
19 Svanur
20 Tekla
21 Tjaldrið

**5-mannafør, gentur**
1 Blikur
2 Bráddur
3 Drekin
4 Dúgvan
5 Falkur
6 Fípan Fagra
7 Firvaldur
8 Frúgvin
9 Havfrúgvin
10 Hvassi
11 Junkarin
12 Kollur
13 Ørnin
14 Ritan
15 Royndin Fríða
16 Sílið
17 Spógvin
18 Súlan
19 Svanur
20 Tekla
21 Tjaldrið

**6-mannfør, menn**
1 Fuglfirðingur
2 Gongurálvur
3 Hósvíkingur
4 Hvessingur
5 Jarnbardur
6 Kollfirðingur
7 Lómur
8 Páll Fangi
9 Riddarin
10 Smyril
11 Snopprikkur
12 Sólmundur
13 Strálan
14 Víkingur

**6-mannafør, kvinnur**
1 Gongurálvur
2 Hvessingur
3 Jarnbardur
4 Kollfirðingur
5 Lómur
6 Páll Fangi
7 Riddarin
8 Smyril
9 Snopprikkur
10 Sólmundur
11 Strálan
12 Víkingur

**8-mannafør**
1 Argjabáturin
2 Heiðabáturin
3 Húsavíkingur
4 Knørrur
5 Kvívíkingur
6 Miðvingur
7 Nevið Reyða
8 Ørvur
9 Sandavágsbáturin
10 Sjóriddarin
11 Kvívíksbáturin

**10-mannafør**
1 Eysturoyingur
2 Havnarbáturin
3 Kjølur
4 Klaksvíkingur
5 Nólsoyingur
6 Skálabáturin
7 Vágbingur
8 Vestmenningur



*Sílið er ein av teimum nýggju bátunum, sum hava boðað frá luttøku til kappingina í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*